## Ferðsluóhapp á Kongabrúnni

Sunnudagin var eitt ferðsluóhapp við parkeringsøkið á Kongabrúnni í Havn. Talan var um tveir bilar, sum rendu saman. Annar koyrdi út fyri hin av parkeringsøkinum.

Báðir bilarnir fingu stóran skaða, men ongin persónsskaði var tó. Kortini vóru báðir bilførararnir og fólkini, sum sótu í flutt á skaðastovuna til kanningar.

Bilarnir vórðu báðir sleipaðir burtur, og nakað av olju, sum var likin úr teimum, spulað vekk.

Eitt annað ferðsluóhapp var í Stoffalág sunnudagin. Ein bilur rendi á ein parkeraðan bil. Bilførari rýmdi av staðnum uttan at geva seg til kennar.

– Hetta er nakað, sum vit uppliva oftari og oftari, sigur vakthavandi.

**-sae-**

## Goyggjandi hundar



Nógvar klagur hava verið um leysgangandi hundar, og er hetta ein afturvendandi trupulleiki, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.

Men hetta vikuskiftið hava tað ikki verið so nógvir leysir hundar kortini. Men fólk hava ringt inn og klagað um, at hundar goyggja og ýla tíðliga um morgnarar. Nakað, sum er til miklan ampa fyri fleiri.

Løgreglan var fleiri ferðir úti hjá fólki í vikuskiftinum og bað tey um at fáa hundarnar at tiga ella at taka teir inn.

– Tað fær øði í fólk, at hundagoyggj og annað órógvar tey fyrrapartar sunnudag, og tað er somuleiðis brot á viðtøkurnar, sigur vakthavandi.

-sae-

## Herverk

Fleiri herverk hava verið í høvuðsstaðnum um vikuskiftið. Talan er einamest um herverk á bilar.

Sunnukvøldið var herverk framt á ein bil uttan fyri Badmintonhøllina. Bilurin varð buglaður, og ein hjólskál brotin.

Herverk varð somuleiðis framt á ein rennigravara hjá kommununi, sum stóð í Steinatúni. Har var ein rútur brotin í hurðini. Fólk sóu gerningsmannin og greiddu so mikið væl frá, hvussu hann sá út, at løgreglan seinni tók hann. Hann viðgekk seg sekan og fær allarhelst eitt endurgjaldskrav frá kommununi og eina bót.

Leygardagin var eisini eitt herverk í Liðagøtu. Har vóru blinkiljós á einum bili brotin, og nummarplátan var samankrúllað.

Tíðliga leygarmorgunin boðaði onkur frá, at tveir rútar vóru brotnir í dómshúsinum. Har eru nú plátir neglaðir fyri, og løgreglan veit onki meira sum nú er.

**-sae-**

## Rúsdrekkakoyring, sigling og súkkling

Løgreglan hevur tikið fleiri fólk í vikuskiftinum fyri brot á ferðslulógina. Ein maður varð tikin fyri at koyra fullur við farstøðina sunnumorgunin. Hesin verður skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

Tveir menn vórðu tiknir leygardagin fyri brot á sjólógina. Fráboðan kom úr Nólsoy, at tveir fullir menn vóru farnir við báti til Havnar.

– Hetta hevur óivað loypt ótta á fólk í Nólsoy, og tey boðaðu so løgregluni frá, sigur vakthavandi.

Menninir vórðu tiknir, tá teir komu á land í Havn, og verða nú ákærdir fyri at sigla ávirkaðir í báti.

Ein fullur maður á súkklu varð eisini tikin leygardagin. Hann súkklaði á eystara Ringvegi við sápufabrikkina, tá hann rendi á ein kantstein og fór runt. Maðurin varð fluttur á Landssjúkrahúsið við smávegis snuddum og fær eina bót fyri at hava súkkla ávirkaður av rúsdrekka.

**-sae-**

## Rok og húsaófriður

Løgreglan í høvuðsstaðnum sigur frá fleiri rokum og húsaófriðum. Men í øllum førum var ikki talan um tað heilt álvarsliga.

– Einamest talan um rok við antin vertshús ella náttklubbar, har tá løgreglan kom á staðið, var tamarhald fingið á støðuna, sigur vakthavandi.

Men í tí eina førinum, har varð ein maður tikin inn á støðina at sova rúsin av sær.

Rok var uttan fyri Eclipse, men har høvdu menninir funnu útav tí, tá løgreglan kom á staðið.

Fleiri ferðir fór løgreglan út til húsaófrið. Har meklaði hon, inntil partarnir vóru komnir niður aftur á jørðina, og so spældi alt væl og friðarliga av.

**-sae-**

## Rendi á í rundkoyring

Við rundikoyringina í Norðurstreymoy hendi eitt ferðsluóhapp um tíggju tíðina leygarkvøldið.

Ein bilførari, sum var ávirkaður av rúsdrekka, misti tamarhaldið á bili sínum og rendi á ein pela í rundkoyringini. Bilførarin royndi síðani at koyra víðari, men bilurin var so mikið illa farin, at ikki bar til at koyra við honum. Bilførarin sjálvur fekk ongan skaða. Aðrar bilførarar, sum komu framvið, boðaðu løgregluni í Runavík frá óhappinum. Maðurin verður nú skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

**-sae-**

## Ferðsluóhapp í Hósvík

Eitt ferðsluóhapp var í Hósvík leygardagin. Tveir bilar, ein koyrdi norðureftir og ein suðureftir, stoyttu saman, eftir at annar bilførarin av ókendari orsøk misti tamarhaldið á bilinum og fór yvir á hina koyribreytina.

Stórur materiellur skaði var, men ongin persónsskaði. Sera hált var leygarkvøldið, so tað verður mett at vera orsøkin til óhappið.

**-sae-**

Jana Dalsgaard:

# Tørvur á sjúkra-røktarfrøðingum



*Jana Dalsgaard, forkvinna í felagnum føroyskir sjúkra-røktarfrøðingar, sigur, at tørvurin á sjúkrarøktarfrøðingum er alsamt vaksandi, og hon óttast fyri, at tað verður heilt galið, um ikki okkurt verður gjørt við støðuna sum skjótast*

**Forkvinnan í felagnum føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar Jana Dalsgaard sigur, at tørvur er á sjúkrarøktarfrøðingum, og um ikki nakað verður gjørt við støðuna skjótt, so verður galin endi. Hetta vísa framrokningar hjá felagnum**

SAMRÁÐINGAR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Ein stórur trupulleiki innan sjúkrarøktarfrøðingarnar er, sambært Janu Dalsgaard, at starvsfólkið fæst ikki at støðast. Og tað heldur hon kemur einamest av tungu arbeiðsbyrðuni, sum bert tykist at vaksa fyri hvørt ár. Og tað er nakað, sum felagið vil arbeiða við, sigur hon.

Harumframt vísa framrokningar hjá felagnum, at um ikki nakað verður gjørt við at útvega fleiri sjúkrarøktarfrøðingar, so verður endin galin. Tað vil siga, at frágongdin er størri í mun til tey, sum byrja at lesa til sjúkrarøktarfrøðing, og tað sær forkvinnan í felagnum sum ein stóran trupulleika.

Hon greiðir frá, at meðalaldurin á starvsfólkunum liggur um 44,2 ár, og tað er rættuliga høgt.

– Meðalaldurin í grannalondum okkara er eisini rættuliga høgur, men Føroyar hava munin, sigur Jana Dalsgaard.

Jana sigur, at okkurt má gerast við støðuna, og hon hevur tvey uppskot um, hvussu tað kann gerast. Hon vísir á, at um fleiri lesandi verða tikin inn, so kann tað vera ein máti at bøta um støðuna.

### Arbeiða longur

Hin mátin, sum hon nevnir, er, um tað verður broytt soleiðis, at tey, ið eru fylt 67, sleppa at halda fram at arbeiða undir somu umstøðum og treytum, sum tey hava, um tey ynskja tað.

– Sjálvandi skal eitt starvsfólk sleppa frá, um tað ynskir tað, tá tað er fylt 67, men tað eru fleiri, sum kanska høvdu viljað sloppið at hildið fram í eina tíð afturat, tí tey hava orku og heilsu til tað, og tað dugi eg ikki at síggja nakað galið í, sigur Jana.

Í dag er tað soleiðis, at tá ein sjúkrarøktarfrøðingur hevur fylt 67, verður viðkomandi uppsagdur, og tað heldur forkvinnan í sjúkrarøktarfelagnum er ein óverdug mannagongd. Felagið hevur gjørt vart við tað, og heldur so avgjørt, at hendan mannagongdin eigur at verða broytt sum skjótast.

– Hví skulu tey ikki kunna halda fram, um tey ynskja og orka tað. Eg meini so við, bæði læknar kunnu arbeiða og eitt nú løgtingsfólk kunnu stilla upp til tey eru 70, vísir Jana Dalsgaard á.

Tað ber til at søkja um at sleppa at halda fram í sínum arbeiði eftir, at ein er farin um tey 67, men tá verður tað sum tímalønt starvsfólk, og tað heldur Jana ikki er nøktandi. Hon heldur, at tey eiga at kunna halda fram við somu treytum og umstøðum, og harvið hevði ein møguligur bati á frágongdini eisini verðið sjónligur, heldur hon.

– Alt hetta eru viðurskifti, sum felagði eisini hevur gjørt politikkararnar varðugar við, so vit hava nógv at arbeiða við, sigur Jana Dalsgaard, forkvinna í sjúkrarøktarfelagnum, sum situr í sáttmálasamráðingum enn.

Felagið leggur størsta dentin á grundlønina og meira frítíð í teirra kravum, og Jana sigur, at samanumtikið er hon hampuliga vælnøgd.

– Vit eru jú í samráðingum enn, so eg fái ikki sagt nakað ítøkiligt, men tað er á einari leið. Tað gongur tann rætta vegin við samráðingunum, og vit stíla ímóti at verða liðug í hesi vikuni, sigur Jana Dalsgaard, forkvinna í felagnum føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar.



# Flokkurin fram um persónar



*Kaj Leo Johannesen verður einasta formansvalevni á landsfundi Sambandsfloksins fríggjakvøldið*

**Fríggjakvøldið gerst Kaj Leo Johannesen nýggjur formaður í Sambandsflokkinum. Sum einasta valevni metir hann seg hava breiða undirtøku úr flokkinum, ið hann vil hava meira sjónligan í føroyskum politikki**

FORMANSVAL
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Eittans valevni er til formanssessin í Sambandsflokkinum, sum skal veljast á landsfundinum um vikuskiftið. Tað er greitt, eftir at freistin at koma við uppskotum var úti klokkan sjey sunnukvøldið.

39 ára gamli Kaj Leo Johannesen varð tíðliga í uppskoti til nýggjan formann í Sambandsflokkinum, eftir at Lisbeth L. Petersen legði frá sær dagin eftir løgtingsvalið. Eisini Bárður Nielsen hevur verið nevndur sum formansvalevni, men hann hevur tó borið seg undan.

Sunnukvøldið kundi Kaj Leo Johannesen so staðfesta, at hann komandi fríggjakvøld kann nevna seg formann í Sambandsflokkinum.

– Eftir at hava fingið fleiri áheitanir, so segði eg herfyri, at um eg fekk breiða undirtøku fyri tí í flokkinum, so ynskti eg at gerast formaður. Og sum eg havi skilt, so havi eg breiða undirtøku, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Savna flokkin

Kaj Leo Johannesen verður formelt ikki valdur til formann fyrr enn fríggjadagin, og tí hevur hann ikki hug at fara í smálutir við sínum framtíðarætlanum við flokkinum.

Men ein av fyrstu uppgávunum verður at savna flokkin eftir stríðið í seinastuni.

– Eg vil hava Sambandsflokkin fram, og persónarnir meira í bakgrundina. Flokkurin hevur í seinastuni verið ov lítið samansjóvaður – eingin flokkur tolir, at persónar ganga egnar leiðir, greiðir Kaj Leo Johannesen frá og leggur afturat:

– Sum formaður vil eg rætta eina hond út til samarbeiði, bæði innanfloks og við aðrar flokkar.

### Løgmansevni

Sum formaður í Sambandsflokkinum gerst Kaj Leo Johannesen eisini løgmansevni floksins. Og hann er til reiðar at taka við hesi avbjóðing, um høvið býðst.

– Sjálvandi havi eg ambitiónir um at gerast løgmaður. Tá eg havi fingið hetta álit, og havi játtað at taka við ábyrgdini, so má eg eisini vera til reiðar at gerast løgmaður, sigur Kaj Leo Johannesen.

Komandi floksformaðurin sigur seg annars vera til reiðar at leggja alla orku í at røkja formanssessin á besta hátt.

– Tá eg havi sagt ja, so havi eg skyldu til at lyfta uppgávuna, og tað ætli eg mær at gera, sigur Kaj Leo Johannesen.

Sum leiðara lýsir hann seg sjálvan at dáma væl at viðgera málini yvirordnað, og annars at býta uppgávurnar út til onnur. Eisini sær hann eina avbjóðing í at motivera fólk og fáa tey at arbeiða saman.

– Eg má savna flokkin, og fáa tingbólkin at virka sum eina eind, staðfestir komandi formaðurin.

Kaj Leo Johannesen er partaeigari í sølufyritøkuni Farex, har hann eisini starvast og er nevndarformaður. Men hann hevur minkað arbeiðsbyrðuna í Farex til nakrar fáar tímar um dagin, fyri at fáa betri stundir til politiska arbeiðið.

### Vinnupolitikkur

Eitt av hjartamálunum hjá Kaj Leo Johannesen er vinnulívið, og sum formaður í Sambandsflokkinum ætlar hann sær at arbeiða fyri at bøta um viðurskiftini hjá vinnuni.

– Vinnulívið er grundarlagið undir restini av samfelagnum. Í dag er vinnan alt ov viðkvom, og vit eru við at gerast ein eftirbátur í Evropa. Tí er neyðugt at skapa góðar karmar fyri vinnuna, sigur Kaj Leo Johannesen.

Tað er eingin loyna, at Sambandsflokkurin vil nærkast Evropeiska Samveldinum, og hesum vil komandi formaður floksins eisini arbeiða fyri. Hann vísir á, at ES umboðar stóran part av føroyskum út- og innflutningi.

– Vit noyðast at vera ein viðspælari í Evropa, staðfestir Kaj Leo Johannesen.

Fyrsta stigið á leiðini er at birta upp undir vitanina um ES í Føroyum. Hetta skal millum annað gerast við eini ráðstevnu um Evropeiska Samveldið.

– Fyrst mugu vit fáa meira at vita um ES. Síðan mugu vit seta okkum spurningin, hvat vit vilja í hesum sambandi.

Kaj Leo Johannesen sigur, at tað ikki kemur nakað uppskot frá sær um føroyska støðutakan til ES-spurningin í næstum. Talan er um eina longri proces. Men velja Norra og Ísland at gerast limir í ES, so hava vit eina nýggja støðu, og so skundar tað undir processina.

Johan Dahl:

## Onga viðmerking

**Frákoyrdi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur onga viðmerking til valið av Kaj Leo Johannesen sum formann í Sambandsflokkinum**

FORMANSVAL
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Onga viðmerking.

Orðini falla prompte, tá Sosialurin spyr Johan Dahl um hansara meting um valið av Kaj Leo Johannesen til nýggjan formann í Sambandsflokkinum.

23. februar varð Johan Dahl koyrdur frá sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum eftir bara 20 dagar í sessinum. Fleiri persónlig viðurskifti úr fortíð hansara vóru tikin fram í ljósmála, og tað var ov mikið fyri partar av Sambandsflokkinum.

Tá Johan Dahl varð valdur til landsstýrismann, fekk hann stuðul frá Edmund Joensen, Marjus Dam og Bárði Nielsen, meðan hann ikki fekk stuðul frá Alfred Olsen, Lisbeth L. Petersen og Kaj Leo Johannesen.

Og tað vóru serliga sambandsfólk úr Suðurstreymi og Norðoyggjum, ið ynsktu at fáa Johan Dahl burtur úr landsstýrissessinum.

Eftir at verða frákoyrdur mælti Johan Dahl til, at Jaspur Vang, ið var næstur honum á sambandslistanum í Suðuroynni, tók sætið sum landsstýrismaður í Fiskivinnumálum. Men sum kunnugt valdi flokkurin Bjørn Kalsø úr Norðoyggjum í staðin.

### Fer á landsfund

Johan Dahl sigur, at hann ætlar sær á landsfundin hjá Sambandsflokkinum um vikuskifti. Og har ætlar hann sær at útgreina sína hugsan um, hvat er farið fram í Sambandsflokkinum í seinastuni.

– Men sum er havi eg ongar viðmerkingar til formansvalið, sigur Johan Dahl.

Lisbeth L. Petersen:

## Vónar at Kaj Leo fær frið at arbeiða

**Fráfarna forkvinnan í Sambandsflokkinum heldur at flokkurin eigur ein góðan formann í Kaj Leo Johannesen**

FORMANSVAL
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Upprunaliga ætlaði Lisbeth L. Petersen at leggja frá sær sum formaður í Sambandsflokkinum á landsfundi floksins komandi vikuskifti. Hon metti seg ikki fáa nóg góða undirtøku innanfloks.

– Har vóru ávísir trupulleikar við baklandinum, sigur Lisbeth L. Petersen, ið annars ikki hevur hug at gera stórvegis viðmerkingar til tað málið.

Men valósigurin 20. januar skundaði undir avgerðina um at leggja frá sær, og Lisbeth L. Petersen segði seg frá sum forkvinnu dagin eftir.

Fráfarna forkvinnan metir, at Sambandsflokkurin eigur ein góðan formann í Kaj Leo Johannesen. Tó kundi hon hugsað sær, at hann hevði havt betri tíð at arbeitt í flokkinum, áðrenn hann kom upp á ovastu rók.

– Talan er um eitt sera krevjandi starv. Tað merkti eg væl, hóast eg hevði drúgvar royndir frá floksarbeiði, áðrenn eg tók við sum formaður, sigur Lisbeth L. Petersen.

Eftir stríðið innanfloks í seinastuni vónar Lisbeth L. Petersen, at nýggi formaðurin fær frið at arbeiða.

Spurt, hvørt ósemjan hevur skatt flokkin, sigur Lisbeth L. Petersen, at tað er trupult at svara uppá. Men ósemjan í nítiárunum, ið millum annað snúði seg um formanssessin, skaddi flokkin tá, vísir hon á.

– Tað hevur stóran týdning, at trúvirði er um flokkin. Og í eini ósemju kann vera trupult at fáa eyga á trúvirði, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hon leggur afturat, at nýggi formaðurin altíð er væl komin at fáa góð ráð frá sær.